NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Móttøka fyri Gunnari

MÓTTØKA
*Myndir: Jan Müller*

Fríggjadagin í farnu viku vóru liðin 25 ár síðani Gunnar Mohr varð settur í starv í heilsøluni hjá Poul Michelsen í Havn.

Sambært honum sjálvum hava hetta verið 25 góð ár.

At leiðslan í fyritøkuni eisini helt tað sama, vísti hon við at skipa fyri móttøku seinnapartin henda dagin, har í hópatali av gestum vitjaðu inn á gólvið.

Gunnar Mohr byrjaði á sinni sum goymslumaður, og er í dag sølustjóri hjá PM



*Feðgarnir báðir vóru í góðum hýri*



*Gistingarhúsbransjan væl umboðað*



*Tey syrgdu fyri at gera starvsdagin góðan*





*Nógvir vinir og kenningar vitjaðu*